# Partur av kalda krígnum

Tað vóru fyrst og fremst hernaðarlig atlit, sum settu ferð á rúmdarkapprenningina millum USA og Sovjetsamveldið. Tá russar tann 4. oktober í 1957 sendu Sputnik í umferð kring knøttin, var hetta ein skelkur hjá USA. Her óttaðust tey, at russar nú kundu leypa á hernaðarlig mál, hvar tað skuldi vera, um ikki USA eisini megnaði at senda fylgisveinar í umferð.



# Khrushchev vildi ikki samstarva

Eftir væleydnaðu Sputnik-ferðina hjá Jurij Gagarin hildu tey flestu, at Sovjetsamveldið var framman fyri USA í rúmdarkapprenningini. Hetta var eisini orsøkin til, at Nikita Khrushchev í 1963 segði nei-takk til eitt amerikanskt tilboð um at samstarva í royndunum at lenda á mánanum. Khrushchev helt, at hetta einvíst var USA at gagni, og hann vildi ikki, at amerikumenn skuldu njóta ágóðan av teknologisku frambrotunum hjá russisikum vísindamonnum.



*40 ár eru liðin, síðani Neil Armstrong sum fyrsti maður setti fótin á mánan*